## Verjuskip til sølu

Danska sjóverjan hevur nú lýst tað lítla sjóverjuskipið Agdlek til sølu. Skipið, sum hevur røkt sjóverju og eftirlit við Grønland í mong ár, verður selt á uppboðssølu í Hjørring, nú sjóverjan í Grønlandi hevur fingið nýggja skipið Knud Rasmussen. Agdlek er smíðað í 1973 og er tað elsta av teimum trimum smáu verjuskipunum, sum hava havt støð í Grønlandi. Hini bæði eru Agpa og Tulugaq, sum eru smíðað í ávikavist 1974 og 1979.



*Tað hevur ljóðað, at kanadiumenn hava hug at keypa Agdlek (Mynd: KNR)*

## Vantandi tilbúgving

Grønlendska tilbúgvingarskipanin kann lítið og einki gera, um tað skuldi hent, at eitt av teimum fremmandu ferðamannaskipunum, sum vitja um summarið, kemur í neyð, og fólkið skal takast av tí. Tað ásannar Steen Silberg Thomsen, løgreglustjóri, fyri KNR. Hann sigur, at sjálvandi høvdu myndugleikarnir gjørt alt, sum gerast kann, men hann ásannar, at tað hevði verið vónleyst at bjarga t. d. 400 ferðafólkum av einum skipi í neyð.

# Út at fiska við ferðafólki





*- Eg hevði ein seksæring, sum fórst í illveðrinum seinast í januar. Nú riggi eg mær so hendan 20-tonsaran til frítíðarfisking og sigling við ferðafólki. Ætlandi fær báturin loyvi til 12 ferðandi í senn, sigur Magni Blástein*

Mynd: Birgir W. Høgnesen

**- Umframt at fiska við útlendskum ferðafólki, fari eg eisini at bjóða meg fram til at geva skúlaflokkum kring landið eina uppliving á sjónum, og her eru nógvir møguleikar, sigur Magni Blástein, sum eisini er maðurin, ið stendur aftanfyri Shark Atlantic**

FRÍTÍÐARFISKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Birgir W. Høgnesen/ Rás2*

Á Skipasmiðjuni í Vestmanna stendur ein 20 tons stórur bátur, sum nú verður riggaður til fiskiskap við ferðafólki og til ferðavinnu annars.

Tað er Magni Blástein, sum er vorðin kendur í ferðavinnuhøpi og ikki minst innan frítíðarfiskiskap, sum eigur bátin, ið ætlandi skal verða klárur fyrst í mai mánaða. Magni er eitt nú kendur sum stigtakarin til kappingina Shark Atlantic, ið er kappingin um at veiða størsta hemaran við tráðu.

- Hetta verður fjórða summarið, at eg fáist við tráðufiskiskap í ferðavinnuhøpi. Eg havi havt ein seksæring, men hann fórst í illveðrinum síðst í januar. So, nú havi eg keypt mær hendan 20-tonsaran, sum eg nú eri í holt við at rigga til vertíðina, sum byrjar í mai.

### Tráðufiskiskapur

Magni sigur, at ætlanin við nýggja bátinum er serliga at brúka hann til tráðufiskiskap saman við ferðafólki, bæði úr útlandinum og føroyingum, sum hava hug at fiska á báti.

Hann sigur, at í juni og í august mánaða koma bæði onglendingar og týskarar upp higar at fiska við tráðu. Teir taka eina viku til tíggju dagar í senn.

Ætlandi fær nýggi báturin hjá Magna, sum skal lúka krøv hjá Skipaeftirlitinum, loyvi at sigla við 12 ferðandi í senn.

- Tá nøkur av ferðafólkunum, eitt nú onglendingarnir, sum koma higar, verða umborð á bátinum ein heilan dag í senn, ber saktans til at gera onkran longri túr, um líkindini eru góð. Kanska vestur í Mykinesfjørð. Annars verður fiskað í sundum og firðum og úr landi annars.

Men væntar Magni, at báturin verður liðugur og klárur at taka í nýtslu, tá ferðavinnutíðin byrjar?

- Í fyrsta lagi verður báturin sjeinaður upp, samstundis sum ymiskar ábøtur og umvælingar verða gjørdar – og so er tað góðkenningin hjá Skipaeftirlitinum. Jú, eg miði eftir, at nýggi Blástein verður liðugur fyrst í mai mánaða, sigur hann.

### Matpakki við

Vit spurdu eisini Magna, um ætlanin er, at fólk, sum koma við bátinum, skulu hava matpakka við, tá dagarnir umborð gerast longri – ella, um hann fer at matgera sjálvur.

- Eg fari at hava matpakka við til eitt nú onglendingarnar og týskararnar, og skuldi tað verið, at teir hava hug til onkra lættari fiskasuppu ella tílíkt, sum dagurin gongur, kann hendan saktans gerast umborð á bátinum.

Hann vísir á, at umstøðurnar við nýggja bátinum verða munandi betri og rúmligari enn við hinum gamla.

Dreymurin hjá Magna er, at frítíðarfisking við ferðafólki gerst ein veruligur partur av føroysku ferðavinnuni.

- Eg byrjaði sum nevnt við seksæringinum, og nú verður so hesin báturin riggaður til, so eg byggi meg spakuliga uppeftir til at taka ímóti fólki, sum vilja njóta frítíðarfiskiskap á báti.

### Skúlanæmingar

Magni Blástein sigur, at nógvir møguleikar eru við einum tílíkum báti í ferðavinnuhøpi.

- Eg fari eisini at bjóða meg fram til at geva skúlaflokkum eina uppliving á